# Leiðari

**Søkt verður eftir leiðara til býlingshúsið undir Fjalli.**

**Starvið**
Vit bjóða eitt starv við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har leiðarin millum annað kemur at standa fyri tí umsitingarliga og námsfrøðiliga partinum á stovninum. Harumframt hevur leiðarin eitt tætt samstarv við aðrar kommunalar dagstovnaleiðarar umframt umsitingina í Tórshavnar kommunu.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at umsøkjarin hevur námsfrøðiliga útbúgving, kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í sínum arbeiði.

Umsøkjari við innlitið í umsiting og kunnleika til edv. hevur fyrimun. Dentur verður lagdur á, at leiðarin kann skapa eitt gott samstarv millum starvsfólk, børn og foreldur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið, ið er fulltíðarstarv, verður sett 1. juli 2000. Løn sambært sáttmálanum millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Maibritt Jacobsen, núverandi leiðara, tlf. 314665, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000. Merk umsóknina "Leiðari".

Í býlingshúsinum undir Fjalli, sum bleiv bygt í 1988 og útbygt í 1999, eru tvær barnagarðsstovur við 20 børnum á hvørjari stovu. Í vøggustovuni eru 12 børn. Umframt leiðaran arbeiða 12 fólk á stovninum..

Tórshavnar kommuna



# BILSMIÐUR

Vit sóknast eftir einum dugnaligum bilsmiði til persónbilaverkstað okkara at byrja skjótast.

Ætlanin er, at tann, ið settur verður í starvið, skal verða næsti maður verkførarans. Hetta viðførir eftirútbúgving til kunnleikastøði av Volvo og Renault persónbilum.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum.

Um tú hevur fyrispurningar um arbeiðið, kanst tú ringja og spyrja eftir Johannes Rasmussen, verkførara.

**pf. Brøður Petersen Bilar**
Hoyvíksvegur 61 • Boks 3130 • FO-110 Tórshavn • Tel. 31 43 60 • Fax 31 56 96

*Brøður Petersen Bilar umboðar Volvo þersónbilar, lastbilar og bussar og Renault þersónbilar. Umframt þersónbilaverkstað hava vit eykalutagoymslu, søludeild og lastbila- og bussverkstað.*

Sosialurin - 311820

# Havnameistari til Sørvágs Havn

Søkt verður eftir havnameistara til Sørvágs Havn.

Kravdir eginleikar: Arbeiðssemi og nærlagni og harafturat er tað ein treyt at hava navigatørútbúgving.

Starvssetanin, arbeiðstíðin, løn og frítíðarskipan verða sambært sáttmála millum Føroyar Skipara- og Navigatørfelag og Sørvágs Kommunu.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Meira fæst at vita um arbeiðsøki og nærri arbeiðsásetingar við at venda sær til skrivstovuna tlf. 332004/333122.

Møguligar umsóknir við frámerki: »Umsókn havnameistari« skulu vera Sørvágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 25.04.2000 kl. 12.00.

— Sørvágs Kommuna

# Hús í Mækjugøtu

Sethúsini Mækjugøta 11 (Mækjugøta er síðugøta niðarlaga til Villingardalsveg) eru til sølu.

Húsini eru bygd í 1991, og eru tey annar parturin av dupulthúsum. Húsini eru í tveimum hæddum.

Niðara hæddin hevur køk, tvær stovur, kamar og bað.

Ovara hæddin hevur trý kømur og bað.

Áhugað vendið sær til undirritaðu.

**Demmus Hentze, lrs.**
**Turið Debes Hentze, adv.**
E. Jalsgøta 1, Tórshavn
Tlf. 31 14 60

# FM JUDO 2000

## fyri einstaklingar



Leygardagin 8. apríl 2000
í Auluni í Eysturskúlanum
í Tórshavn

**Skrá:**
kl. 09.30............Øll verða vigað.
kl. 10.00............Unglingar og Dreingir -32 kg., nýggir.
kl. 11.20............Dreingir -38 kg., -42 kg. og +54 kg., nýggir.
kl. 11.50............Dreingir -38 kg. og -42 kg.
kl. 12.45-13.30 Døgurða.
kl. 13.30............Dreingir -48 kg., -54 kg. og +54 kg.
kl. 15.00............Dreingir. Opin bólkur.

Eftir hvørt bólkaumfar verða heiðurstekin handað.

**JUDOSAMBAND FØROYA**

Sosialurin - 311820

**SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ RASMUSSEN & WEIHE**

# Skrivari til oljufelag

Fyri eitt av teimum stóru oljufeløgunum verður søkt eftir einum fólki til skrivstovuna í Tórshavn. Hetta er eitt fyribilsstarv til september 2000, eftir tað kann talan møguliga verða um varandi starv. Um so verður, er hetta eitt starv við góðum framtíðarmøguleikum fyri tað rætta fólkið.

**Um starvið**
Tann, ið settur verður í starvið sum skrivari hjá skrivstovustjóranum, skal
- taka sær av postinum, skipa fyri ferðing, leggja fundir tilrættis bæði innan- og uttanhýsis, standa fyri brævaskifti, telefon, taka sær av fyrispurningum bæði innan- og uttanhýsis og hjálpa til við at greiða teir
- skipa og røkja neyðuga arkivering, bæði manuelt og elektroniskt
- framleiða tilfar (overheads, slides, tíðindatilfar) bæði til høvuðsleiðsluna og til onnur
- taka ímóti vitjandi á skrivstovuni og skipa fyri neyðugari umboðan
- gera eitt sindur av bókhaldsarbeiði.

**Krøv til umsøkjaran**
- má vera kønur í nýtslu av teldu (tekstviðgerð/rokniark/grafik/e-mail), arkivering, hava evnir at fyriskipa og leggja til rættis, t.d. at skipa fyri fundum, ferðing etc.; útbúgving er ein fyrimunur, men áhugi og royndir telja eisini nógv
- má kunna samskifta væl við onnur bæði starvsfólk og kundar, herundir føroysku oljumyndugleikarnar, høvuðsskrivstovu felagsins o.o., má vera stinnur í skrivligum enskum og føroyskum, má vera opin og fyrikomandi sum andlit felagsins úteftir
- skal hava góð evnir at skipa og raðfesta arbeiði, duga at taka stig til at veita kundunum tænastu, kunna arbeiða undir trýsti og duga at leggja tíðina til rættis
- skal kunna taka aktivt lut í skipan av organisatiónini og vera við til at fyriskipa og leiða fundir millum partar í fyritøkuni
- eigur at skilja týdningin av, at ætlanir verða fylgdar, og at arbeitt verður eftir fastløgdum stevnumiðum, mannagongdum og standardum.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Umsóknir við CV skulu sendast til P/f Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Ole Guldborg Nielsen.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo



HOTEL VÁGAR

# LEIÐARI SØKIST

**Vit vænta at tú:**
- Arbeiðir sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er fyrikomandi
- Skapar góðan trivnað
- Hevur kunnleika til mál m.a. enskt

**Hotel Vágar bjóðar tær:**
- Eitt spennandi starv
- Góð starvsfólk
- Fjølbroyttar uppgávur

Á Hotel Vágum eru 25 kømur, matstova, góðar skeiðumstøður og cateringkøkur. Á hotellinum starvast 15 fólk.

Hotellið er ein partur av virkseminum hjá Flogfelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Una Danielsen tlf 340044.

Umsóknir skulu sendast til:

**Hotel Vágar**
Att.: Uni Danielsen
FO-380 Sørvágur

Umsóknarfreist 17. apríl 2000

# BRÚKTBILA-MARKNAÐUR

**Renault Mégane 1,6**
Árg.: ..................10/96
Km.: ................29.000
Kr.: ...............115.000,-

**Renault 19 Chamade**
Árg.:..................11/90
Km.: ............155.000
Kr.: ................45.000,-

**Renault Mégane 1,4**
Árg.: ..................12/98
Km.: ................13.000
Kr.: ...............119.000,-

**Toyota Corolla Aut.**
Árg.: ................02/91
Km.: ............108.000
Kr.: ................45.000,-

**Toyota Carina 2,0 Gli aut. gear**
Árg.: ...................1993
Km.: .............144.000
Kr.: .................90.000,-

**Ford Sierra DIESEL**
Árg.: ..................09/93
Km.: .............122.000
Kr.: .................75.000,-

**Toyota Carina 2,0**
Árg.: ..................12/91
Km.: .............154.000
Kr.: .................75.000,-

**Volvo 240 St. car**
Árg.: .................07/91
Km.: ..............85.000
Kr.: ................79.000,-

**Volvo 440 GL**
Árg.: ..................02/89
Km.: .............156.000
Kr.: .................35.000,-

**Mitsubishi Galant DIESEL**
Árg.: ..................07/85
Km.: .............280.000
Kr.: .................35.000,-

Sosialurin - 311820

**VOLVO-RENAULT í Føroyum**
- har kundin verður settur í hásæti -

**pf. Brøður Petersen Bilar**
Hoyvíksvegur 61 • Boks 3130 • FO-110 Tórshavn • Tel. 31 43 60 • Fax 31 56 96

# Leið 50 Leirvíksfjarðarleiðin

**Dúgvan** kemur ikki aftur í sigling fyrr enn mikumorgunin **12. apríl 2000.** Hetta vegna meirarbeiði í sambandi við dokking. Meðan røkir stóra Ternan siglingina.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Rutuupplýsingin, tlf. 343030 - fax 343003
Heimasíða: www.ssl.fo

# Frá Stranda kvøldskúla

Framsýning av handaligum arbeiði verður í fimleikahøll skúlans sunnudagin 9. apríl frá kl. 15 til 19.

**Kvøldskúlaleiðarin**

# Frá Stranda kvøldskúla

Málningaframsýning verður í húsunum hjá Postverk Føroya, fyrr Sjóvinnubankin, leygardagin 8. apríl kl. 15 til 19 og sunnudagin somu tíð.

**Kvøldskúlaleiðarin**

# Viðgerðarstovan



**Erna S. Hákonardóttir**
Alkohol- og Familjuráðgevi

Faklig ráðgeving • »Opin viðgerð« Einstaklingar • bólkar • skeið.

Ringið og fái nærri at vita.
**Tlf. 31 55 45**

# Avgreiðslufólk
## til Timburgoymsluna

Vit sóknast eftir trimum avgreiðslufólkum til Timburgoymslu okkara í Tórshavn at byrja sum skjótast.

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennadi og skjóttvaksandi virkisøki innan handil við byggitilfari.
Starvið fevnir um dagligt avgreiðsluarbeiðið av byggitilfari.
Umsøkjarar við vanligum koyrikorti og truckloyvi hava fyrimun, men er hetta ikki ein treyt.

Vit vænta at tú:

- ert nærlagd/ur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og kanst livað upp til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn.

Umsóknin skal sendast til:
**P/f Havnar Timburhandil**
**Heykavegur 4**
**Box 3038**
**FO-110 Tórshavn**
**Att: Tony Ditlevsen**

**Freistin at søkja er 15. Apríl 2000**

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Tony Ditlevsen á tlf. 31 12 50

**P/f Havnar Timburhandil**

HT TILFAR

**Byggekram**